

# Lítið av sild á Sandoyarbankanum

**Saksaberg hevur leitað eftir sild eystanfyri Føroyar, men tað var ikki nógv at síggja**

SILDAVEIÐA
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

16. juli fór Saksaberg av Gøtu eystur um Føroyar. Teir leitaðu í tveir dagar og høvdu bara eitt kast, mest fyri at kanna slagið, støddina, og um makrelur var uppíblandaður. Teir komu inn aftur 18. juli, skrivar Vinnan á heimasíðu síni.

Okkurt árið hevur sild verið at fingið á Sandoyarbankanum um hesa tíðina.

Hesaferð var eisini nakað at síggja, men sildin stó so spjadd. Men nógvur makrelur var at síggja, Saksaberg hevur ikki makrelloyvi, so har var ikki meira at gera hjá teimum. Teir liggja nú aftur í Gøtu, har teir hava ligið í umleið ein mánað.

Sildin hevur verið ov rak og tí hevur prísurin eisini verið lágur. Nú er sildin heilt væl fyri, og um Ólavsøkuna er hon uppá tað feitasta. Í fjør loystu skipini, sum trola og partrola, aftaná Ólavsøku, og væntandi verður tað, tað sama í ár.

Skiparin, Virgar Fagraklett, sigur at teir eiga um 3.000 tons eftir at fiska av sildakvotuni og leggur afturat at hann roknar við at prísurin fer at batna, sum summarið líður. Manningin á Saksaberg telur 11 mans.

# Heldur bíligari at fylla tangan



*Tað verður nú heldur bíligari at fylla á tangan - í hvussu er fyribils*

**Shell Norge hevur lækkað prísin á bensini, og nú lækkar Statoil Hydro eisini prísin. Orsøkin er fall í oljuprísunum á heimsmarknaðinum seinastu tíðina**

OKURPRÍSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vildmund@sosialurin.fo*

Oljuprísirnir eru falnir úr 145 dollarum fyri tunnuna í byrjanini av juli, niður í 130 dollarar í gjár.

Higartil eru prísirnir á bensini bert falnir í lítlan mun hóast lækkingina í prísunum fyri tunnuna.

Shell Norge hevur tvær ferðir lækkað sínar prísir, og nú lækkar so eisini Statoil Hydro prísirnar, skrivar Verdens Gang.

- Sum fylgju av lækkingini í oljuprísunum hava vit gjørt av at lækka okkara listaprís við 15 oyrum – niður í 13,69 fyri 95-bensin og 14,09 fyri diesel (norskar krónur).

Tað sigur upplýsingarleiðarin hjá Statoil Hydro, Ørjan Heradsteit.

Hann leggur aftrat, at felagið teir komandi dagarnar fer at meta um, hvørt talan verður um uppaftur størri lækkingar.

Shell Norge hevur sum nevnt eisini lækkað sínar prísir.

- Vit hava lækkað prísin einaferð við 10 oyrum, og hava nú framt enn eina lækking við 10 oyrum aftrat, sigur maðurin, sum hevur ábyrgdina av prísunum hjá Shell Norge, Eivind Granås.

Verdens Gang skrivar, at ein lækking í oljuprísunum upp á 10% hendan mánaðin, eigur at kunna lækka prísirnar á bensini og diesel við ávikavist 40 oyrum, um prísfallið á oljutunnuni heldur sær.

**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
The Faroe Islands Fisheries Inspection



## 1. STÝRIMAÐUR TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

**3 avloysarastørv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið endurlýst.**

Trý avloysarastørv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt. Størvini eru tíðaravmarkað soleiðis, eitt til 1. mars 2009, eitt til 1. apríl 2009 og eitt til 1. juli 2009.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur**
- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Arbeiðsuppgávur sambært starvslýsing í Góðsku- og tyrgdarhondbókini.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv**
- Útbúgving sum skipsførari.
- Vinnubræv sum stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi (STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Stórur dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.
- Prógv, so sum frc, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.
- Aldur og heilsu til at gerast vinnukavari. Fyrimunur men ikki krav.

**Setanartreytir**
Størvini eru lønt í 28. lønarflokki eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelagnum. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið. Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 5. aug. 2008 klokkan 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
**Heykavegur 6**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo